# Har Jehova Vitni og jazz



*Hennara trúgv er ongin forðing fyri, at hon kann fylgja dreyminum um at gerast songkvinna. - Eg og foreldur míni ynskja bara, et eg syngi og ferðist í einum sunnum umhvørvi, sigur ársins songrødd, Anna Nygaard, ið er Jehova vitni*

Hóast hon er Jehova Vitni, verða tað ikki gospel løg vit fara at hoyra frá ársins songrødd, Onnu Nygaard. – Mín trúgv og mín tónleikur eru hvør sítt. Men skuldi eg valt, valdi eg trúnna, sigur 16 ára gamla songkvinnan

Fyri einum ári síðani hevði hon ongantíð trúð tær, um tú segði við hana, at hon fór at standa á palli á Summar Festivalinum í ár sum ársins songrødd. Og í grundini var tað heilt av tilvild, at 16 ára gamla Anna Nygaard av Glyvrum yvirhøvur var við í kappingini.

Í dag er hon ikki í iva. Dreymurin er at gerast songkvinna á høgum støði og kunna liva av tónleikinum. Hon setir tó eina treyt – at hennara trúgv sum Jehova vitni sleppur at fylgja henni inn í tónleikaheimin.

## Kom við uppá avboð

Fleiri eggjaðu annars Onnu Nygaard til at tekna seg til kappingina um Ársins Songrødd fyrr í ár. Men unga glyvragentan smæddist og tordi illa at halda seg framat. 1.apríl fekk hon tó boð um at hon var við í kappingini. Tá hon fann út av, at hetta bert var ein aprílsøga, gjørdist hon eitt sindur vónbrotin. Hetta skuldi tó ikki verða seinasta orðið, tí Anna Nyggard hevði fingið blóð upp á tonna. Og hóast freistin at tekna seg til kappingin var úti, eydnaðist tað henni at sleppa við, eftir at onkur hevði givið avboð.

Restina av søguni kenna vit. Frálíka framførslan hjá Onnu Nygaard av sanginum "Valerie" hjá Amy Winehouse í innleiðandi umfarinum tók øll á bóli.

Hon kom beint í finaluna, og har sang hon sangin "Baby I Love You" hjá Arethu Franklin. Henda sang hon so mikið sannførandi, at hon gjørdist greiður vinnari av kappingini. Við í vinninginum var millum annað, at hon sleppur at framføra á Summar Festivalinum fríggjadagin 8.august.

## Foreldrini hjálpa

Sangur er ein nýggjur partur av lívinum hjá Onnu Nygaard. Men samstundis eru eisini onnur virði, ið hava rættiliga stóran týdning fyri hana – ikki minst trúgvin. Hon er Jehova Vitni, og hon ynskir at fylgja síni trúgv fult út. Spurd, um ikki tað eru nakrar konfliktir millum tað, at hon nú er trínur inn á tónleikaleiðina og lívið annars sum Jehova Vitni, svarar hon, at í høvuðsheitum er tað ikki.

– Eg leggi stóran dent á at halda trúnna og tónleikin sundurbýtt í størst møguligan mun. Tey bæði hava sum so einki við hvørt annað at gera. Tað einasta, ið eg og foreldur míni hugsa um, har okkara trúgv kanska spælir inn, er í sambandi við hvørjum umhvørvi, eg framføri í. Vit ynskja, at har, sum eg syngi, koma fólk, tí tey eru áhugaði í tónleikinum og ikki bara fyri at ballast. Vit ynskja bara, at tað er eitt sunt umhvørvi, sum eg syngi og ferðist í, sigur Anna Nygaard avgjørd.

Foreldrini stuðla henni fult út í sanginum, og halda tað vera stuttligt, at hon nú hevur fingið henda møguleikan. Tað, at tey eru Jehova Vitni er ikki nøkur forðing fyri, at Anna Nygaard livir henda dreymin út. Foreldrini ráðgeva henni og hjálpa henni við teimum tilboðum, ið koma inn. Á tann hátt kunnu tey í samráð velja og vraka millum tey tilboð, hon fær.

Tá Anna Nygaard verður spurd, hvat hon hevði valt, um hon noyddist at velja millum tónleikin og trúnna, er hon als ikki í iva.

- So hevði eg sjálvandi valt trúnna. Mín trúgv er ein týðandi partur av mær, og hana taki eg fram um alt. Tað er ein lívsstílur, ið eg havi valt, og hann ætli eg mær ikki at broyta. Men eg eri eisini rættiliga sannførd um, at eg ongantíð verði noydd at taka eina slíka avgerð. So leingi, eg ikki komi út í nakað óføri, og haldi meg til tað, ið er sømiligt innan trúarinnar karmar, verða ongar konfliktir millum trúnna og tónleikin. Og soleiðs skal tað gjarna verða, sigur Anna Nygaard.

## Trúgvin ávirkar ikki sangirnar

Hóast trúgvin er ein týðandi partur av hennara lívi, merkir hetta ikki teir sangir, Anna Nygaard velur at syngja. Til kappingina Ársins Songrødd sang hon sangir eftir Amy Winehouse og Arethu Franklin, og yvirhøvur er úrvalið sera breitt. Hon syngur soul, R&B, motown og jazz, umframt nógv annað, og í høvuðsheitum eru tað sangir, ið fólk kennast við, hóast aðrir eisini eru við.

Sigast má, at Anna Nygaard er sera sjáldsom á tann hátt, at hon ikki syngur gospel, hóast hon opinlýst er trúgvandi. At leggja dent á at syngja gospel og lovsangir eyðkennir annars ofta tónleikarar úr øðrum samkomum, men hetta hevur Anna Nygaard ikki hugsað stórvegis um.